# Minningarorð um Sverra Djurhuus

*f. 11. juli 1920*
*d.18. oktober 2003*

**Leygardagin 18. oktober andaðist Sverri Djurhuus í Havn, 83 ára gamal. Sverri var útbúgvin bilmekanikari og hevði í mong ár egnan bilverkstað í Havn. Hann var eisini rithøvundur og hevur latið eitt gott íkast til føroysku bilasøguna**

Sverri var føddur 11. juni 1920 inni í Líð í Kollafirði, hann var næstelstur av teimum tíggju børnunum hjá Onnu Sofíu, f. Hansen, ættað úr Lon í Miðvági, og Olivar Djurhuus, úr Kollafirði. Sverri gekk í skúla í Kollafirði og fór sum 14 ára gamal til skips.

Á heysti 1939 fór hann til Danmarkar á Haandværkerhøjskolen í Haslev. Undir krígnum var hann í Danmark og í Týsklandi. Hann kom heim aftur til jóla í 1946. Eftir tað koyrdi hann hýruvogn í Havn, til hann í 1949 kom at arbeiða á bilverkstaðnum hjá Sigird av Reyni í Rættará. Í 1952 gjørdi hann sveinaroynd sum bilmekanikari og arbeiddi nógv ár í Rættará, har hann eisini hevði bilverkstað sjálvur. Hann hevði eisini bilverkstað í Janstovugøtu og í Hornabø. Hann gavst við bilverkstaðnum í 1970, tá hann var fyri einum arbeiðsóhappi á Hornabø, har hann brendist illa.

Í desember 1970 fekk hann koyriloyvi á bilstøðini Auto í Havn og koyrdi har til 1993, tá hann mátti gevast, tí eyguni vóru farin at bila.

Sverri giftist í 1949 við Ingeborg, f. Olsen, av Deild í Vestmanna. Tey hava búð í Tórfinsgøtu síðan 1955 og fingu fýra børn: Gunvør, Finnbjørn, sum doyði í 1972, bert 21 ára gamal, síðan eru tað Annmari og Rúna, sum báðar búgva í Danmark.

Sverri hevur í nógv ár fingist við at skriva, hann hevur skrivað onkrar stuttsøgur og givið út bøkur sum t.d. *Lívsmyndir*, sum kom út í 1979 og *Lívið er eittans*, sum kom út í 1983. Hann var tjóðveldismaður og skrivaði eisini greinar í 14. September. Eisini hevur hann latið inn áhugavert søguligt tilfar til áhugafelagið Føroya Ellisakfør um føroysku bilasøguna. Hann skrivar á sín sermerkta hátt um tíðina, tá hann arbeiddi í Rættará og um bilasøguna í Kollafirði og har um leiðir.

Sverri var ein góður svimjari. Sum ungur fekk hann heiðursmerki fyri svimjikappingar í Havn, og hann hevði sína jøvnu gongd niðan í Svimjihøllina í Gundadali til fyri stuttum.



*Sverri Djurhuus heldur røðu við veitsludøgurðan, tá felag okkara fylti 10 ár í februar í fjør. Undir liðini á honum situr Einar Petersen úr Sørvági, sum eisini er deyður*

# Mortan Joensen, fyrrverandi sýnsmaður, farin

*f. 26. juli 1926*
*d. 23. august. 2003*

**Leygardagin 23. august andaðist Mortan Joensen á Argjum 77 ára gamal. Mortan var útbúgvin maskinsmiður og maskinmeistari. Hann sýnaði bilar fyri Tryggingarsambandið Føroyar frá 1969, til hann legði frá sær fyri aldur í 1993**

Mortan Joensen var føddur á Argjum 26. juli 1926, sonur Honnu Margrethu, f. Mortensen, vanliga nevnd Hanna hjá Linu, av Argjum, og Jacob Paula Joensen, vanliga nevndur Norðskála Palli, ættaður frá Norðskála.

Mortan arbeiddi eina tíð í súkklusmiðjuni hjá André Andrésen, áðrenn hann fór at læra til maskinsmið hjá Wenzel Petersen í Havn. Tá hann varð útlærdur har, fór hann til Klaksvíkar á maskinskúla. Eftir at hann hevði tikið maskinmeistaraprógv, fór hann til Danmarkar, har hann tók víðkað maskinmeistaraprógv. Hann sigldi sum maskinmeistari við t. d. trolaranum Jóannesi Patursson, Smirli og Ternuni hjá donsku sjóverjuni. Hann sigldi við Ternuni undir Klaksvíksstríðnum í 50-unum.

Síðst í 50-unum fekk hann starv sum maskinmaður á fiskavirkinum Bacalao í Havn. Í 1969 varð hann settur í starv sum bilsýnsmaður hjá Tryggingarsambandinum Føroyar. Hetta starv røkti hann, til hann legði frá sær fyri aldur.



*Mortan Joensen sýnaði bilar fyri Tryggingarsambandið frá 1969 til hann legði frá sær fyri aldur í 1993 – og var tí sera væl kendur í bilavinnuni í Føroyum*

Mortan hevði stóran áhuga fyri mekanikki. Hann var servicemaður hjá Thomas Dam, har hann umvældi súkklur, knallertir og motorsúkklur. Hann hevði í mong ár verkstað í kjallaranum í húsum sínum á Argjum. Hann var ein av trúgvu limunum í Føroya Ellisakførum, og dámdi honum væl at koyra túrar á motorsúkklu síni saman við øðrum argjamonnum sum t. d. Sverra Mortensen og Steingrím Joensen, sum allir høvdu sama áhuga fyri motorsúkklum.

Mortan sat í nøkur ár í bygdarráðnum á Argjum. Honum dámdi eisini væl at fáast við seyð.

Í 1953 giftist Mortan við Maritu, f. Jacobsen, úr Miðvági, dóttir Alvildu, ættað uppi við Garð úr Leirvík og Dávur Hansen, úr Kirkjarstovu í Miðvági.

Marita og Mortan fingu synirnar Hans Paula og Dan, sum báðir búgva á Argjum.

Mortan andaðist góðar tríggjar vikur eftir at Maritu og hann kundu halda sín gullbrúdleypsdag tann 2. august í heiminum á Argjum.




VETRARDEKK ...
Kom niðan á Oyggjarvegin, og fá ordilig dekk



P/F Meinhardt Arge



# Til minnis um Kurt Dal-Christiansen

*f. 5. oktober 1947*
*d. 16. oktober 2003*

**Hósdagin 16. oktober 2003 andaðist Kurt Dal-Christiansen í Havn, 56 ára gamal. Kurt var útbúgvin bilmekanikari, og hansara sergrein innan hetta yrki var upprætting og lakkering. Hann var fyrimyndin hjá nógvum av sínum starvsfeløgum**



*Kurt hevur havt stóran týdning fyri upprættings- og lakkeringarbeiði í Føroyum. Hann hevði ivaleyst nøkur viðfødd evnir, sum hann brúkti á sín serstaka hátt*

Kurt var føddur í Keypmannahavn 5. oktober 1947. Saman við beiggjanum Per bleiv hann sum smádrongdur ættleiddur av føroysku foreldrunum, Annu og Arnold Dal-Christiansen í Havn.

Kurt byrjaði sum ungur at arbeiða uppá bilar, og hevði hann stóran áhuga í hesum faki. Enn eru tað fleiri sum minnast hansara snøggu Rambler kassabilar, og hvussu væl hann dugdi at pynta bilar, bæði sínar egnu og aðrar.

Hann lærdi til bilmekanikara hjá Jóhannes Berg, og kom at arbeiða á ymiskum bilverkstøðum, sum t. d. hjá Carlo Petersen, Reyni Service, Jonhard Brøðraberg og hjá Ivan Johansen. Hann arbeiddi eisini á øðrum bilverkstøðum í styttri tíðarskeið. Fyrst í 90-unum hevði hann egnan bilverkstað við Smyrilsvegin í Havn, til hann mátti gevast vegna sjúku fyri umleið 10 árum síðan.

Kurt hevur havt stóran týdning fyri upprættings- og lakkeringarbeiði í Føroyum. Hann hevði ivaleyst nøkur viðfødd evnir, sum hann brúkti á sín serstaka hátt.

Hann lat einki arbeiði úr hondum, uttan at tað var perfekt, og hann setti eisini krøv til sínar arbeiðsfelagar. Teir sum hava arbeitt saman við Kurt, vita, at um hann meinti, at ein arbeiðsfelagi ikki gjørdi sítt arbeið nóg væl, so segði hann tað við viðkomandi og gav samstundis góð ráð um, hvussu hetta ávísa arbeiði skuldi havt verið gjørt. Soleiðis lyfti hann standardin upp á bilverkstøðunum, har hann arbeiddi. Hann dugdi eisini sera væl at leggja sær arbeiði til rættis, alt var væl umhugsað, sum hann gjørdi.

Hann hevði eisini serlig evnir til at seta litir saman og varð hann nógv umbiðin av málingahandlum og bilverkstøðum til at blanda lakk. Tá bilverkstøð kring landið høvdu trupulleikar við at at fáa lakkið at líkjast, vóru boð eftir Kurt. Um hann t.d. fekk eitt bensindeksil í sama liti sum bilurin, var tað bert ein lítil løta, til rætti liturin varð funnin. Hetta var áðrenn bilverkstøðini sjálvi fingu tól at blanda lakk við.

Seinnu árini búði Kurt á Røktardeildini á Landssjúkrahúsinum. Hann átti dóttrina Eilis, sum býr og í Vejle, og abbasynirnar Marcus og Mathias.

# Bobby Brockie farin

*f. 12 sept. 1926 -*
*d. 13. apríl 2003*

**Sunnudagin 13. apríl 2003 andaðist Robert Brockie, vanliga nevndur Bobby, 76 ára gamal. Bobby kom sum smádrongur til Føroya. Hann var hann best kendur sum handilsmaður, bilasølumaður, bretskur konsul og fyri sítt arbeiði í Havnar Svimjifelag**

Bobby Brockie varð føddur í Edinburgh í 1926, hann var elstur av trimum systkjum. Foreldrini vóru Cecilie og Robert P. Brockie. Í 1933 var pápin biðin um at verða leiðari á handilsfyritøkuni Charles Mauritzen í Føroyum. Fyritøkan var úti í Tinganesi og átti hon allar teir reyðu bygningarnar, har landsstýrið í dag húsast.

Í apríl 1934 flutti so øll familjan til Føroya, og Bobby kom at vaksa upp úti í Tinganesi. Familjan búði í teimum uttastu bygningunum, og vóru hinir bygningarnir brúktir til skrivstovur, lagur og annað.

Bobby gekk í skúla hjá nonnunum, og tað var skjótt, at hann lærdi tað føroyska málið. Hann fekk skjótt ábyrgd og kom at hjálpa til við øllum fyrifallandi arbeiði í fyritøkuni.

Tá kríggið brast á og Føroyar blivu hersettar av bretum, var hann málsliga so væl fyri, at hann bleiv brúktur sum tulkur millum bretar og føroyingar. Hann var eisini við, tá leitað varð eftir einum hóskiligum staði at leggja ein flogvøll.

Pápin var bretskur konsul og nógv fólk komu í heim teirra í Tinganesi.

Handilin hjá Charles Mauritzen var stórhandil, og øll stríðsárini gekk so gott sum allur vøruflutningur til Føroya um hetta felag. Teir sendu regluliga farmaskip til Føroya, sum t. d. Barjama, Baranda og Sauternes, ið gekk burtur í Fugloyarfirði 7. desember í 1941. Teir innfluttu skipsútgerð, kolonialvørur, tubbaksvørur, kol og salt. Útflutningurin var saltfiskur, klippfiskur, medisinlýsi og fiskavørur.

Eftir kríggið var Austin bilverksmiðjan í Onglandi ein av teimum fyrstu, sum kom í gongd aftur. Tá fekk fyritøkan hjá Charles Mauritzen í Skotlandi eina áheitan frá Austin, um teir kundu viðmæla onkran, sum kundi umboða teirra bilar í Føroyum. Teir vístu á sína egnu deild her, og telegram kom beinleiðis frá Austin bilverksmiðjuni, har teir fingu bjóðað umboðið fyri Føroyar. Sjálvt um fyritøkan hevði skaffað næstan allar vørur undir krígnum, var hetta nakað nýtt fyri teir.

Fyrstu lýsingarnar við Austin bilum vóru at síggja í føroysku bløðunum í januar 1946. Fyrstu bilarnir vóru Austin: Eight, Ten, Twelve og Sixteen. Teir vóru innfluttir beinleiðis úr Onglandi tey fyrstu árini.

Ognirnar hjá Charles Mauritzen í Tinganesi vórðu í 1947 seldar til Tryggingarsambandið Føroyar, men fyritøkan leigaði tó skrivstovuhølir, goymslubygningar og serviceverkstað til Austin bilarnar.

Fyritøkan fekk eisini umboð fyri Triumph motor súkklurnar.

Nakað eftir ein stóran ásettan eldibrand í Tinganesi í 1950, leigaðu teir stovuhølir frá Trygd á Bryggjubakka, meðan goymslubygningarnir og verkstaðurin hildu fram úti í Tinganesi, til teir í 1963 fluttu inn í nýggjan bygning í Jónas Broncksgøtu, har teir fingu alt undir eina lon. Tá átti Landsstýrið ognirnar í Tinganesi.



*Robert Brockie andaðist 13. apríl – 76 ára gamal*

Í 1978 yvirtók familjan Brockie fyritøkuna, og kom hon at eita P/F Robert P. Brockie & Co. Í 1980 yvirtók triðja ættarliðið, Derek Brockie, alt virksemi sum hevði við bilarnar at gera og stovnaði fyritøkuna Bilcentrið. Fyritøkuna sum í dag eitur D. B. Bilar í Jónas Broncksgøtu.

Bobby var við til at endurstovna Havnar Svimjifelag og gjørdi hann eitt stórt arbeiði í hesum felag. Hann var nevndarlimur í Havnar Svimjifelag frá 1959-60 og formaður í felagnum frá 1960 til 1972. Seinni bleiv hann heiðurslimur í Havnar Svimjifelag.

Hann var ein sera góður svimjari, og í síni tíð í Havnar Svimjifelag gjørdi hann eitt sera stórt arbeiði at læra børn og ungdómar í Havn at svimja. Hann var í svimjihylinum kvøld eftir kvøld, har hann ótroyttiliga vandi ungar svimjarar við góðum úrsliti. Hann gleddist eisini, tá nýggja svimmjihøllin varð tikin í brúk, tí nú hevði svimjiítrótturin í Havn endiliga fingið góðar karmar at virka undir.

Bobby var nevndarlimur í Tórshavnar Ítróttarráð frá 1966 til 1979. Hann var stjórnarlimur í Ítróttarsambandi Føroya frá 1973 til 1977 og formaður í svimjideildini, sum skipaði fyri kappingum av ymiskum slag.

Í 1946 giftist Bobby við Ninu, f. Hansen, úr Funningsfirði. Tey búðu fyrstu árini inni hjá foreldrunm úti í Tinganesi. Seinni keyptu tey hús á Ternuryggi.

Í 1955 keyptu tey eitt grundstykki í Pedda við Steinsgøtu og í 1956 fluttu tey inn í nýggj hús har. Tey fingu børnini Alan, Derek, Ednu, Robbie og Ian.

Nina andaðist í 1994.




PÓLAR
Akkumulatorar til øll endamál
Sigmundargøta 26 • FO 100 Tórshavn • Føroyar
Tel 318237 • fax 318367 • fart. 212860 • 218347